



# Tinglimir fingu gamlar møblar heim við

**Gomlu møblarnir hjá løgtingsumsitingini standa nú heima hjá fólkavaldum politikarum.**
**– Vit hava ikki pláss fyri teimum, sigur Súsanna Danielsen, stjóri á Løgtingsskrivstovuni.**
**– Men vit bjóðaðu okkum at selja teir, sigur Tróndur Ennistíg, leiðari í endurnýtsluhandlinum hjá Alv "Tinghúsið" á Hjalla**

ENDURNÝTSLA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Tróndur Endurstíg, leiðari á endurnýtsluhandlinum "Tinghúsið" á Hjalla, var sera vónbrotin, tá hann bert fann fýra skrivaraborð frá Løgtinginum í bingjuni í morgun. Hann hevði annars vónað at fáa eina rúgvu av góðum vørum at selja. Myndin er av Tinghúsinum á Hjalla, tá tað læt upp*

Tað gav at bíta seinnapartin í gjár, tá Kári á Rógvi, løgtingslimur fyri Sjálvstýrisflokkin, sendi miðlunum fráboðan um, at tinglimir høvdu fingið tilboð um at fáa sær burturav gomlu skrivstovumøblunum hjá umsitingini, sum skuldi hava nýtt.

Í teldubrævinum, segði Kári á Rógvi, at politiska skipanin er tað reina sjálvtøkuborð, har løgtingsmenn í allan dag hava tikið sær ókeypis skrivstovumøblar. Eisini vísir hann á, at uppskot um heldur at lata Tinghúsinum hjá ALV útbúnaðin at selja til góðgerandi endamál, varð vrakað.

### Plásstrot í Løgtinginum

Vit hava spurt skrivstovustjóran hjá Løgtinginum, Súsonnu Danielsen, hví løgtingslimirnir fingu tilboð um at taka møblarnar heim til sín sjálvs. Hon fortelur, at tey longu hava fullar goymslur av gomlum møblum og lutum, og ikki hava pláss fyri meira. Tey settu seg í samband við endurnýtsluhandilin á Hjalla "Tinghúsið", sum Alv rekur, og við Reyða Kross. Tinghúsið vísti áhuga fyri lutunum, meðan Reyði Krossur takkaði nei. Eisini fingu starvsfólkini í umsitingini, flokkarnir og tinglimir boð um, at tey kundu fáa sær, um tey vildu. Men, at tað skuldi ganga skjótt, tí tingini fóru at verða beind burtur dagin eftir.

– Her var talan um skrivstovuinnbúgv til 12 starvsfólk. Stór skrivaraborð, stólar og reolir, sum onki peningavirði hava. Vit góvu sjálvandi ikki fínar designaramøblar burtur, sigur Súsanna Danielsen, sum undrast stórliga á, at miðlarnir yvirhøvur taka málið upp.

– Vit sendu ein teldupost út til tinglimirnar. Tað skuldu vit helst ikki gjørt. Í øllum førum ikki til tann eina, sigur hon, og leggur afturat, at bert nakrir fáir tinglimir vóru áhugaðir í gomlu møblunum.

Súsanna Danielsen greiðir frá, at í sambandi við, at tinghúsið varð umvælt og telefonverksbygningurin tikin uppí, var innrætting við í ætlanini. Men umsitingin fekk ongantíð nýggjar møblar.

– Vit hava skula keypt nýggjar møblar síðan 2003, tá vit fluttu inn, tí teir gomlu hóskaðu ikki til minimalistiska stílin, sum er í restini av húsinum. Tað manglaðu bara til okkara í umsitingini og til formannin, sigur Súsanna Danielsen, sum metir, at nýggju møblarnir kosta einar 2-300.000 kr.

– Um hetta málið kann skapa øsing og seta tingfólk í ringt ljós, so skal eg taka tað á mín kappa. At hetta skal vera ein sensatión, tað skilji eg ikki, tí søluvirðið er onki á tí gamla, sigur Súsanna Danielsen, Løgtingsstjóri.

### Virði fyri Tinghúsið

Men, at søluvirðið er onki, er Tróndur Ennistíg, leiðari í hinum Tinghúsinum í býnum ósamdur í. Tinghúsið á Hjalla er endurnýtsluhandil, har fólk við skerdum førleika selja burturkast, sum er somikið gott, at tað kann endurnýtast og seljast.

Tróndur Ennistíg, leiðari, sigur, at tey ringdu frá Løgtinginum í gjár, og spurdu um tey vóru áhugað í møblunum.

– Hon segði, at har var ein rúgva. Bæði borð og stólar og hillar, sum vit kundu koma eftir. Eg segði henni, at vit gjarna vildu hava tingini, og at vit skuldu bera kostnaðin av flutninginum, um tey sendu ein bil niðan á Brennistøðina við tí. Har hava vit eina bingju til slíkt, sum er ov gott at koyra burtur, sigur Tróndur Ennistíg.

Men hann var ikki sørt vónbrotin, tá hann kom út í bingjuna í morgun, tí har stóðu bara eini fimm borð í bingjuni.

– Tá hevði eg eisini lisið um málið á Portalinum og hugsaði, at tað er forbiðið løgið at býta tað út millum fólk, tá tey høvdu lovað okkum tað, sigur Tróndur Ennistíg, sum longu hevði fyrireikað seg til at herberga øllum, sum hann hevði útlit fyri at fáa. Hann ivast ikki í, at tey høvdu kunna selt møblarnar og brúkt peningarnar til nakað skilagott.

Endamálið við handlinum er at endurnýta góðir lutir. Bæði fyri at verja umhvørvi, og fyri at skapa størv til fólk við skerdum førleikum. Í løtuni starvast fimm fólk í Tinghúsinum, sum handilin eitur.

– Hetta eru fólk, sum annars høvdu gingið fyri onki og fingið pensión. Men meira vit selja, fleiri kunnu vit seta í starv, sigur Tróndur Ennistíg.